ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Lyngby livir aftur í SAS-liguni, og tað kunnu teir í bláu troyggjunum í stóran mun takk Holst fyri*

*BT*

# Tann besti føroyingurin síðani Todi

**Danskir miðlar eru ivaleysir í síni lýsing av Christian Lamhauge Holst. Hann er ikki bara ein fongur fyri føroyska landsliðið, men sanniliga eisini felag sítt Lyngby**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*




*BT rósar føroyska landsliðsspælaranum til skýggja eftir avrikið hjá honum í dystinum móti Viborg*

»Kong Christian« og »Verdensmand« verður Christian Lamhauge Holst skýrdur í mánadagsútgávuni av danska blaðnum BT. Jú, Christian Lamhauge Holst er ógvuliga væl fyri í løtuni. Tað sóu føroyingar í dystinum móti Ukraina, og tað sóu danir nú Viborg vitjaði Lyngby um vikuskiftið. Lyngby lá frammanundan dystinum aftast í deildini við seks stigum. Viborg hevði tíggju stig og tí var tað ikki nógv, ið skilti liðini frá hvørjum øðrum – bert fýra stig. Nú vikuskiftið er av og dysturin spældur, er munurin bara eitt stig, og Lyngby hálaði seg einn sess uppeftir. Hetta eigur Christian Lamhauge Holst stóran part av æruni av. Tað eru danskir miðlar samdir um, og serliga BT ger nógv burtur úr hálva føroyinginum.

BT hevur valt hann at vera besta leikaran í SAS-liguni hetta umfarið. Somuleiðis heldur blaðið, at hann var bæði besti og stuttligasti leikarin á vøllinum móti Viborg, umframt at hann eisini er á vikuliðnum við hægst karakteri av øllum – altso 10, meðan hinir á vikuliðnum fingu 9.

»Kong Christian stjórnar Kongens Lyngby og vísti vegin í botnstríðnum við máli og uppleggi«, stendur í viðmerkingini til, at Holst endaði í álopinum á vikuliðnum hjá blaðnum.

Eisini grundgevingin fyri at velja hann til besta leikaran hetta umfarið, er full av rósandi orðum: »Lyngby livir aftur í SAS-liguni, og tað kunnu teir í bláu troyggjunum í stóran mun takk Holst fyri. Som ein sannur einmansherur grundlegði hann sigurin«

### Slitin eftir landsdystir

Seinastu dagarnir hava verið strævnir hjá Holst. Upp á átta dagar spældi hann tríggjar dystir – fyrst Frakland leygardagin, Ukraina mikudagin og so Viborg sunnudagin.

Afturfyri fær hann rós oman á rós og fyllir hann meginpartin av eini síðu í ítróttarinnlegginum í mánadagsblaðnum hjá BT: »Slitin eftir eina harða viku við dystum fyri Føroyar. Tá er tað flott at skora og finna liðfelagarnar í blindum«, stendur í greinini, sum samanber Christian Lamhauge Holst við Toda Jónsson: »Stórt yvirlit og naskar atsóknir. Tann besti úr Føroyum síðani Todi Jónsson«, metir BT eftir dystin, har Holst skoraði fyrsta málið í 2-0 sigrinum, umframt at hann legði upp til ein risamøguleika.

BT ger somuleiðis nógv burtur úr, at Holst hevur spælt landsdystir í farnu viku. Sum blaðið tekur til, so er hann ikki einans toppskjútti hjá Lyngby við seks málum, men eisini føroyskur landsliðsáleypari. Tað merkti at farna vika var merkt av nógvari ferðing.

»Tað hevur verið ein strævin vika. Eg kom ikki heim frá Ukraina hósdagin, so tað hava ikki verið nógvir dagar til at koma fyri seg í«, sigur Christian Lamhauge Holst við BT. Hann leggur at aftrat, at hann helst hevði kunnað pressað seg eitt sindur aftrat: »Men eg var ógvuliga troyttur«, segði hann við BT. Meðan tað gongur væl hjá Holst at finna vegin til málið, so gongur minni væl hjá liðfelaganum Tem Hansen at finna veg á vøllin. Hann legðist sjúkur eftir at vera komin heim úr Ukraina, og hevur tískil ikki vant ella spælt dyst.

### Kann ikki samanberast við Toda

Høvuðspersónurin sjálvur tekur allur rósurnar rættiliga avslappað. »Tað er altíð stuttligt at verða rósur á henda hátt. Men eg haldi ikki at tað er rætt at samanbera meg við Toda. Faktiskt meti eg, at samanberingar sum heild eru nakað undarligt nakað«, sigur hann við Sosialin.

Christian Lamhauge Holst greiðir frá, at hann síðsta hálva árið er vorðin ein betri fótbóltsspælari: »Tað haldi eg, at eg eri blivin. Tað ger so aftur, at eg kann spæla á einum hægri støðið og við størri yvirskoti«. Skemtandi leggur Holst aftrat, at tað ikki var so nógv yvirskot í dystinum sunnudagin.

»Eg var troyttur. Men sigurin var kærkomin. Vit liggja enn í tyngra endanum, og eg eri harmur um støðuna. Hinvegin merkir tað bara, at er uppaftur meiri neyðugt við góðum avrikum frá leikarunum. Tað er eingin grund at missa móti, og eg trúgvi at støðan verður øðrvísi hjá okkum seinni í ár«, sigur Christian Lamhauge Holst.

## Umbering til Jógvan Martin

Á forsíðuni í hósdagsblað okkara var ávísing til dystarfrásøgnina um landsdystin millum Ukraina og Føroyar. Á forsíðuni varð landsliðsvenjarin, Jógvan Martin Olsen, endurgivin fyri at siga, at tað var eingin skomm at tapa 5-0. Her var hend ein misskiljing millum redaktiónina og útsenda blaðmannin. Orðini hevur landsliðsvenjarin ongantíð sagt, men var hetta ein staðfesting hjá blaðmanninum, og framgongur hetta eisini av tilfarinum inni í blaðnum.

Vit biðja lesaran og Jógvan Martin Olsen um umbering fyri harmiliga mistakið.

**-blaðstj.**